# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Jaspur Midjord

### f. 04.08.1924 - d. 07.12.2007

Hann lá framyvir køksborðið - við tí brúna kaffikrússinum í høgru hond - kaffiroykurin leitaði sær upp ímóti loftinum. Eitt ár var ligið síðani hansara elskaða blóma følnaði, tey vóru á gullbrúdleypsferð á flatlondum tá hon slóknaði - og hansara lívsins ljós brann út og við henni kámaðist ljósglæman í eygum hans. »Hann sang fyri mær«.

*Sig nærmer tiden, da jeg må væk,*
*jeg hører vinterens stemme;*
*thi også jeg er kun her på træk*
*og haver andensteds hjemme.*

*Jeg vidste længe, jeg skal herfra;*
*det hjertet ikke betynger,*
*og derfor lige glad nu og da*
*på gennemrejsen jeg synger.*

*Jeg skulle sjunget lidt mer måske -*
*måske vel også lidt bedre;*
*men mørke dage jeg måtte se,*
*og storme rev mine fjedre.*

*Jeg ville gerne i Guds natur*
*med frihed spænt mine vinger,*
*men sidder fast i mit snævre bur,*
*det alle vegne mig tvinger.*

*Jeg ville gerne fra højen sky*
*udsendt de gladere sange;*
*men blive må jeg for kost og ly*
*en stakkels gældbunden fange.*

*Tit ligevel til en smule trøst*
*jeg ud af fængselet titter*
*og sender stundom min*
*vemodsrøst*
*med længsel gennem mit gitter.*

*Lyt og, o vandrer! til denne sang;*
*lidt af din vej du hidtræde!*
*Gud ved, måske det er sidste gang,*
*du hører livsfangen kvæde.*

*Mig bæres for, som ret snart i*
*kvæld*
*at gitterværket vil briste;*
*thi kvidre vil jeg et ømt farvel;*
*måske det bliver det sidste.*



Lítla hvíta húsið í Øravíkarlíð, við trøðni, víkini og neystinum. Tú var vanur at siga »Mítt paradís«. Har sleit tú tínar barnaskógvar. Tað var áðrenn pedagogar og barnaansing sóu dagsins ljós. Hóast móðir og faðir vunnu sær til lívsins uppihald hinumegin fjørðin, frá morgni til myrkurs í fiskaarbeiði, so føldi tú teg sjáldan einsamallan, sum tú tók til, - »vinirnir hjá mær vóru kúgvin, kálvurin, hønurnar, dunnurnar og heiðafuglurin. Tað einasta tú var bangin fyri, var tarvurin. Tí hevði tú altíð ein stiga standandi uppat húsinum, so tú kundi fara uppá hoyløðuna um illa vildi til.

Tey róðu við lítla árabátinum til arbeiðis, morgun og kvøld. Um kvøldið, tá tú væntaði tey heim, sat tú frammanfyri gluggan og stardi út á fjørðin, tí tá mánalýsi var, kundi tú síggja árabløðini lyftast upp úr sjónum langt burt.

Tá ið tú var borin til dópin, var, sum vant skjótasti maðurin funnin at bera teg í kirkjuna, og væl mann hava verið runnið, tí tú var líka kvikur, inntil sjúka boygdi teg.

Tú var borin út úr somu kirkju, sum tú var við til at byggja, sum formaður fyri innandura arbeiðinum.

Hóast mong ár í Havn, var tín yndissangur »Tvøroyrarsangurin«.

Nú er myrkt og øskukalt í Krosslíð 4, men minnið um hjartahita og gestablídni livir.

Hvíl í friði kæri vinur.

**Egin**

## Dagurin

**1. juli Teobaldus,** deyður ár 1066. Franskur aðalsmaður, ið á ungum árum velur eitt lív sum einbúgvi. Var fyrst í Luksemburg, ger so pílagrímsferð til Santiago de Compostella í Norðurspania, til Róm og fær sær at enda tilhald í Vincenza í Italiu, har hann varð prestvígdur.

†

Kunngjørt verdur fyri ætt, vinum og kenningum at elskaða mamma, omma og vermamma okkara

**Karla Joensen**
Vestmanna

andadist á eldrasambýlinum í Vestmanna, leygardagin 28. juni, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Petur, Helgi og Katrin**

*Tey, ið vilja minnast Karlu, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið í Vestmanna.*

Heðin Hansen:

## 25 ár á Reyni Service

1. juli eru 25 ár liðin síðan Heðin Hansen fór í bilmekanikaralæru hjá Reyni Service í Hoyvík.

Eftir at hava starvast sum lærlingur, og síðani sum sveinur eina tíð, tók Heðin við sum verkstaðsleiðari.

Heðin hevur verið við í menningini av verkstaðnum øll hesi árini, eisini tá ið hugsað verður um DAF-góðkenning og TSM/Toyota góðkenning.

At Heðin er hálvur hvalbingur er einki at taka seg aftur í, tað kann viðhvørt kennast eitt sindur "ógvusligt" fyri persónin handan hornið ella hinumegin diskin, tað er tó ikki so illa meint.

Vit ynskja Heðini góðan byr og hjartaliga tillukku við teimum 25 árunum.

Heilsan

**starvsfelagar**



## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Ludvík Abrahamsen**
ættaður úr Oyndarfirði, búsitandi í Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til øll, sum fylgdu Ludda til hansara seinasta hvíldarstað og ein hjartans tøkk fyri stórfingna hjálp í sambandi við jarðarferðina.

Somuleiðis takk fyri peningagávur til Reyða Kross.

*Kærar heilsanir*
**Harry, Heðin, Arthur, Arnhild og Jana v/ familjum**